# tivið) kom í málningin



49. *Krigerens afsked*. Efter vase i »de røde figurers stil«, signeret af EUTHYMIDES, omkr. 500 før Kr. Antiquarium, München.

hesum myndum, er dýpdin. Tað, sum er avmyndað fjart, er lítið, og tað, sum er næst, er stórt, men ein røtt uppfatan av dýpdini er ikki til steðar. Herculaneum og Pompeji vórðu lagdir í oyði av gosfjallinumn Vesuv ár 79 eftir Kr. f. Okkum tykist kanska løgið at menniskja hevur havt so torført at koma fram til tað røttu flatufatanina í myndlistini. Jú, men tað er ein torfør mannagongd at fáa eina rúgvu av lutum og flatum at passa neyvt saman á einum lítlum lørifti, hóast í dag allar lógir hesum viðvíkjandi flóta.

Flestu næmingar vita hvussu ein rekkja av trøum ella húsum verða teknað í perspektivi, men vit mugu flyta okkum fram til 1400 talið, tá ið dýpdin kom í sannan búna inn í myndlistina.

Lat tað verða sagt, at gotikkurin varar frá 500 til 1500 og at renæssancan varar frá 1400 talinum til uml. 1600 stórt sæð, hóast her eru nøkur eyðkenni, sum kundu verið verd at tikið við í hesi grein, men er ikki høvi til tess - kanska seinri verður (ella onkur annar) nomið við hesi fyribrigdi.

## Fileppo Brunelleschi

ì Firenze búði ein arkitektur, ið æt Fileppo Brunelleschi (1377-1446). Hesin gjørdist undangongumaður í endurføðingini av tí rómversku stórleikanum. Hann var útbúgvin gullsmiður, verkfrøðingur og arkitektur. Hann vitjaði í Rómaborg og tók mát av teimum gomlu toftunum av palassum og templum. Gjørdi skitsur av sniðum, skapum og skreytprýðum á skjøldrum, súlum, veggum, bogum og súlnagongum. Hansara hugsan var at skapa eina nýggja leið í byggilist, har tey gomlu elementini frá tí klassiska arkitekturinum skuldu vera við til at skapa nýtt snið í javnvág og vakurleika í einari arkitektoniskari endurføðing.

Sum hugsað so gjørt. Hetta eydnaðist hesum mæta arkitekti at endurføða tað klassisku formgevinginna, ein mótsøgn móti gotiska arkitekturinum. Hann læt byggilistina í ein nýggjan búna við íblástri úr rómverksari byggilist. Brunolleschi var stavnamaður, tá ið renæssancu-byggilistin kom fram, men hann ber eisini æruna av einum nýggjari uppdaging, og tað var perspektivið.

Eg havi nomið við griksku nýhugsanina um perspektivið og tað hellenistisku uppfatina av dýpdarkensluni í málninginum (t. d. hellenistiska arvin í Pompeji), men ikki dugdu tey gomlu listafólkini tey matematisku hugtøkini, ið vóru galdandi í myndini, tá ið lutir og flatur skuldu takast av í støðd og máti, meðan tey hjánaðu burtur í baksýni. Tað var Filippo Brunelleschi, sum gav listini henda matematiska møguleika. Tit kunna ætla, at hendan kveiking gjørdi um seg.

## Massacio

Ein ungur listamaður Massaccio (1401-28) at navni, tók hesa hugsan til sín í einum veggmálningi í kirkjuni St. Maria Novella í Firenze uml. 1427. Tað er ein mynd av Jesusi á krossinum, Johannusi og Mariu og einum eldri keypmanni og konu hansara á knæ uttanfyri. Borgarar í Firenze hava staðið sum kánus, tá ið henda mynd varð avdúkað, ikki bara tað, at tað var í røttum perspetivi, men eisini tí, at tað var komið eitt "hol" í veggin. Tað var sum um fólk fóru inn í veggin, tá ið tey skoðaðu myndina. Hetta hevur gjørt umhvørvið í Firenze til ein listaligan tvátt, sum mannaeygað ikki hevði sæð áður. Tíannverri doyði hesin mæti listamaður alt ov ungur, áðrenn hann fylti 30 ár. Ofta sæst verðin stór í smáum gluggum, har listafólk liva dagin og tíman øðrvísi enn vit onnur í kjøti borin deyðiligu, meðan listafólk, sum nema við ein strong í listini, sum flyta mørk, ikki eiga tíman og løtuna, men ævinleikan. Mong dømi eru um hetta.

Massacio (merkir Klosshans) doyði ungur. Hann hevur verið stak dugnaligur og evnaríkur og tað, sum hann gav mannaættini, hevur staðið sína roynd til dagin í dag.

Hann setti mark millum gotikkin og endurføðingina í myndlistini, rennæssancuna – burtur frá tí listaliga reinleikanum, og tí dekorativa, sum var í gotikkinum, til eina sanna fatan av tí, ið eygað sá. Í staðin fyri lættar blómufyltar flatur í glógvandi gróti og grýti, trinu ljóslivandi linjuskap fram í myndina, sum fast skap(skulpturar) í avtakandi dýpdarkenslum, sum hjánaðu burtur í perspektivinum.

Hetta bleiv ikki sjálvt málið í rennæsanciskari list, men gjørdist bert ein partur av myndini, sum kom nærri at okkara fatan og okkara tilviti, ið er knýtt at myndini. Hetta hevur hildið tørn líka til dagin í dag, hóast allir streingir eru brostnir listaliga, har alt er loyvt í myndini, sum bæði kann vera gagnligt og minni gagnligt sum so mangan, tá ið um perspetivið ræður.

Bókmentir: Listasøga: E. H. Gombrich, list í Renæssancuni: Andrew Martindal og alnótin.